Tí›indi

N‡ggj prógv móti Microsoft

Ákærin í tí amerikanska monopol rættarmálinum móti Microsoft, statsadvokaturin David Boies, hevur lagt fram teldubrøv frá Bill Gates, sum Boies sigur koma at tyngja KT-risan. Sambært Boies prógva teldubrøvini, at Microsoft á sumri í 1999, langt eftir at rættarmáli› var fari› í gongd, framvegis royndi at misn‡ta monopolstø›u sína á markna›inum.

Í einum teldubrævi gevur Gates starvsfólkum sínum bo› um at gera broytingar í telduforritinum Outlook, sum vil gera ta› verri at n‡ta forriti› saman vi› eini hondteldu frá Palm-computer, me›an forriti› skal rigga betur saman vi› lummatelduni Pocket PC, i› n‡tir Microsoft Windows sum st‡risskipan.

Í einum ø›rum teldubrævi skrivar Bill Gates um sambandi› millum Nokia og Symbian-alliansuna, sum eru vi› at menna eina tri›ju st‡risskipan til lítlar hondteldur, fartelefonir og samskiftis dimsar. Her skrivar Gates: *Teir eru í veruleikanum í kríggi vi› okkum, og vit eiga at seta ví›fevnd tiltøk í verk, millum anna› vi› als ikki at samstarva vi› teir.*

KT-huglei›ing

Í løtuni sitir tú vi› KT-horninum nummar 11, og solei›is eru 11 vikur farnar, sí›an Sosialurin fór í holt vi› hendan táttin. Næstu vikurnar fer KT-horni› í summarfrí, og eftir ætlan ver›ur tátturin tikin uppaftur einafer› seint í august. Vit fara her at enda hendan táttin fyribils vi› at huglei›a eitt sindur um sjálvt evni› KT vi› stø›i í tí vit nevna *samantengd kunningarambo›*

Kunningartøkni (KT) er í dag eitt hugtak, i› øll hava á munni meir ella minni, og or›i› ver›ur ofta n‡tt í fleng.

Ein kanning, sum *Institut for Anvendt Fremtidsforkning* hevur lati› gera, vísir at 90 prosent av dønum halda evni› vera áhugavert, og halda at talan er um eina náttúrliga menning.

69 prosent eru av teirru uppfatan, at myndugleikar og onnur hava ov líti› tamarhald á menningini, me›an 54 prosent óttast menningina sum heild.

Um vit líta nærri at nevndu kanning og vita hvussu fólk fyrihalda seg til tøknina vi›víkjandi ymsum vørum, hava 80 prosent ein positivan hugbur› mótvegis n‡ggju tøknini til bilar, me›an einans 22 prosent eru positiv mótvegis tøkniligu n‡tsluni av gjaldskortum og ø›rum plastikkortum.

Júst hetta vísir, at hugbur›urin er eitt sindur ambivalentur mótvegis kunningartøknini.

Spurningurin er ikki, um vit ynskja at vera vi› í kunningarsamfelagnum, men hvussu vit vilja vera vi›.

Ein all‡sing av kunningartøkni kundi veri›: ***Vitan, sum vit n‡ta til førleikar vi› at kunna n‡ta data og kunning í ávísum arbei›suppgávum.***

Kunningartøknin kann b‡tast upp í tríggjar bólkar:

- Umsitingartøkni
- Samskiftistøkni
- Kunningartøkni bygt inn í a›rar lutir

Umsitingartøkni



Her ver›ur EDV l‡st sum eitt starvsøki til umsiting, t.e. eftiransing, planlegging og st‡ring. N‡tslan av KT til hetta hevur merkt eina rationalisering og effektivisering av teimum einstøku uppgávunum.

Samskiftistøkni

Á hesum øki hevur ta› gjøgnum seinastu árini veri› ein veldug menning. Digitaliseringin av talu, video, myndum og ø›rum ver›a nú send gjøgnum ka›alar bæ›i innanh‡sis og uttanh‡sis, og samstundis ber til at senda digitalt gjøgnum satelittar um allan heimin.

Hetta merkir, at marki› millum arbei›splássi› og heimi› ikki longur er eins greitt og fyrr. Ein stórur partur av arbei›inum kann nú gerast heima, um bert ein hevur atgongd til at senda og móttaka data — digitalt.



Kunningartøkni bygt inn í arbei›i›

KT ver›ur í dag meira og meira innbygt í tey vanligu arbei›sambo›ini.

Vit síggja millum anna›, at úrslit av arbei›inum automatiskt ver›ur samla› á laboratorium v.m. hetta merkir ofta, at arbei›i› ver›ur meira einfalt, sum aftur hevur vi› sær, at n‡ggj faklig øki kunnu yvirtaka ein part av arbei›søkinum.

Samanlagt kann ein í dag siga, at skræddaraseyma›ar skipanir eru á veg út, me›an standardskipanir, vi› ymsum broytingum eftir tí einstaka tørvinum ver›a meira n‡ttar í framtí›ini.

Nútí›in og framtí›in

Nevnda tríb‡ti› av kunningartøknini er sjálvsagt bert ein møguleiki. Kunningartøkni er í dag naka› vit øll merkja, naka› vit øll eru partar av, og ikki minst, naka› vit noy›ast at seta okkara álit til í framtí›ini.

Kanningin omanfyri vísir, at fólk sum heild eru gla› fyri, at n‡tøknin er at finna í bilunum nú á døgum. Tó mugu vit ganga út frá, at ikki øll eru samd um at henda menning er av tí betra. Havi ofta hoyrt bilsmi›ir av eldra ættarli›inum sagt, at teir ikki longur tora at lata hjelmin upp, tí har er tann bera tøkni, i› teir onki skilja av.

At fólk á hinum bógnum óttast gongdina vi›víkjandi gjaldskortum og annars skrásetingsum heild, er ikki ringt at skilja. Ta› ver›ur í dag n‡tt stór orka til at lóggeva á hesum økinum. Í Føroyum hava vit eisini skrásetingarlógir fyri bæ›i ta› almenna og privatvirki. Kunningartøknin kemur heilt víst at vinda upp á seg á hesum øki, og ta› ver›a sett stór krøv til politikarnar í framtí›ini, at teir skulu hava eitt vaki› eyga.

Eitt anna›, i› kemur at merkja framtí›arkjaki› er, hvønn leiklut myndugleikarnir skulu hava í sambandi vi› menningina á tøkniliga økinum. Ráki› higartil hevur veri› til høgru, og londini kring okkum eru vor›in meira liberal. Eitt nú ver›a fleiri og fleiri almennir stovnar lagdir um til almenn partafeløg, og seinni heilt privatisera›ir. Hetta ráki› tykist eisini at vera komi› til Føroya, og seinasta útspæli› er umlegging av Postverki Føroya.

Ivamál tykist tó vera um, hvussu gott innlit politikarar hava í samfelagsligu gongdina. Onkur vil vera vi›, at ta› als ikki eru teir, sum st‡ra samfelagnum longur, tí aftanfyri ryggin á teimum er ein rívandi menning í gongd, sum nógvir av teimum helst hava ringt vi› at skilja.

Eitt køliskáp sum keypir inn

Tá vit spyrja serfrø›ingar á økinum, eru teir ikki gla›ir fyri at gita um framtí›ina, tí royndir vísa, at gitingar hesum vi›víkjandi onganti› halda. Vit fara heldur ikki at geva naka› bo› uppá hvat framtí›in eigur at bjó›a okkum, men enda tó vi› eini søgu, i› vísir hvønn veg ta› gongur.

Amerikumenn hava uppfunni› eitt køliskáp, sum sjálvt heldur hús. Í køliskápi› hava teir sett nakrar fotosellur, og vi› at tr‡sta inn uppl‡singar um hvat tú vilt hava í køliskápinum, finnur køliskápi› sjálvt út av at senda ein ordra til nærmasta handil gjøgnum e-mail skipanina, og samstundis rindar køliskápi› rokningina – av tínari konto.

Vøran kemur tó á gamlan hátt, nevniliga vi› einum ørindadrongi, i› ber vøruna til dyrnar. Møguliga ver›ur tó gjørligt at e-maila vøruna í framtí›ini í besta Jens Lyn st‡li, men hetta gita vit sjálvsagt ikki um.

finn@sosialurin.fo

Domainsøla trífaldar inntøkuna á lítlari oyggj í Stillahavinum



Íbúgvarnir á tí lítlu atollu stillahavsoynni Tuvalu hava rættuliga skora kassan. Sølan av Internet landaey›kenninum hevur gjørt oyggjafólki 388 milliónir krónir ríkari.

Eitt líti› oyggjaríki› nor›an fyri Fijuoyggjarnar, hevur selt rættindini til landsins domainnavn .tv til Idealab, sum er eitt Internetvirki› í Kalifornia. Hetta skrivar bretska bla›i› The Times. Prísurin er 388 milliónir føroyskar krónir (ella 50 milliónir US$), sum svarar til 3 fer›ir bruttotjó›arinntøkuna lítla oyggjalandi› hevur.

Fyritøkan Idealab, sum fyribils hevur gjørt eina tíggju ára avtalu, roknar rættuliga vi› at spinna gull uppá hetta sjáldsama eftirnavn. Hvør sjónvarpsrás, sum ætlar sær at senda á Internetinum, vil ikki fegin hava hendur á einum .tv eftirnavni?

Fyri íbúgvarnar á Tuvalu kemur sølan í tøkun tíma. Um og tá tann globala upphitingin kemur, ver›ur Tuvalu ein av teimum fyrstu atollunum sum søkka í havi›. Tær seinastu útrokningar siga at atollan bert liggur tveir metrar yvir havinum.

"Vit vita ikki nær ta› fer› at henda" sigur ein av íbúgvunum, men vit vita at tá ta› hendir er ov seint at gera naka› sum helst. Forsetin á atollunum, Bikenibeu Paeniu, sigur vi› The Times at fyribils útrokningar vísa, at ta› ver›a umlei› 200 dollarar fyri hvønn av teimum 10.600 íbúgvunum í árligum eykakostna›i.

Telefonvekslarin í telduni

El & Tele hevur konsessión til at veita telesamband. Teir hava serliga lagt seg eftir at veita trá›leyst samband. Eisini veita teir háhastigheitssamband vi› sokalla›ari XDSL/ADXL-útger›, umframt alla a›ra útger›, sum kn‡tir lokalnet saman.

Sí›an byrjan hevur felagi› El & Tele, sum teir bá›ir Rasmus Magnussen og Ey›un Egholm eiga í felag, hevur slagor›i› veri› "Alt á einum sta›". Alt er í hesum føri el-, edv- og telefonkervi›. Serliga tvey tey seinast nevndu eru vi› at renna saman í eina loysn. Eitt er at ka›alar sum ver›a lagdir, kunnu brúkast til bæ›i edv- og telekervi›, eitt anna› er at telefonvekslarin í dag eisini kann leggjast inn á telduna. Fyrimunirnir vi› at hava telefonvekslaran í telduni eru fleiri. Serliga eru ta› skjótleikin og samankoyringin vi› onnur forrit sum Outlook, adressubok og tekstvi›ger›, sum ger at telefonvekslarin á telduni er hentur. Tá sær tú til dømis allar uppl‡singar um tann sum ringir, á›renn tú hevur tiki› horni›, ta› veri› seg navn og a›rar uppl‡singar sum tú sjálv/ur velur at leggja inn.

IP-telefoni

Eitt sum er nógv frammi júst nú er IP-telefoni. IP-telefoni er telefonlinja sum brúkar IP (Internet Protokol). Ta› er IP sum er grundarlagi› undir samanrenningini á tele- og edvøkinum. IP tøknin gevur telefólkunum, sum eitt nú hjá el & tele, møguleika effektivt at gagnn‡ta ver›a datainfrastruktur. Her ver›ur ikki serliga hugsa um Interneti›, har er gó›skan til telefoni ikki nóg gó› — enn, men í stóran á verandi WAN, (sí gráu boksina). Hetta merkir at til dømis el & tele kunnu tengja telefonvekslaran á edv kervi›, uttan at kundin fær eyka kostna› fyri samtalurnar.

Tey sum eru í telekommunikationsvinnuni eru serfrø›ingar og hava nógva vitan innan telefoni. Hetta gevur tílíkum fyritøkum sum el&tele eina sterka stø›u innan KT-øki›, sum ger› teir til ein tí›andi partnara í framtí›armenningini á KT-økinum. IP-telefoni er komin fyri at ver›a og ta› ver›a feløg sum el & tele, sum koma at veita hesa tænastu.

Alt IP-øki› og teldu-telefoni samanrenningin, eisini kalla› CTI (computer-telefoni-integration), eru n‡ggj økir fyri øll. Á el & tele fær kundin eina heildartænastu. Seljarnir kunnu rá›geva kundanum um hvussu edvkervi› kann tengjast saman vi› telekervi› og teirra tøkningar kunnu konfigurera eina og hvørja loysn eftir kundans ynski.

LAN og WAN

LAN er eitt lokalnet. Eitt lokalnet er eitt net har fleiri teldir eru samantengdar í sama bygningi, ella í bygningum sum liggja tætt saman.

Eitt WAN er eitt vítt lokalnet, tvs at tvey ella fleiri lokalnet eru tengd saman, sum til dømis at allar bankadeildirnar eru tengdir saman vi› Elektron.

Ókeypis office pakki á donskum

Ókeypis office pakkin frá Sun, i› nevnist Star Office, kemur nú í danskari útgávu. Star office 5,2 ver›ur sambært Sun, klárur til at taka ni›ur á Alnetinum ókeypis í juni mána›i, á 11 ymsum málum. Umlei› ein mána seinni ver›ur møguligt at bíleggja ein fullfíggja›an office pakka á fløgu, og vi› danskari viegleiðing, fyri einans 250 krónur.

Sun keypti í fjør t‡sku fyritøkuna Star Division, i› er eitt vøruhús í selur ritbúna, fyri umlei› 75 milliónir krónur. Sí›an hevur Sun, sum millum anna› ger ambætara tólbúna›, arbeitt vi› at gera Star Office forritini til ein ókeypis kappingarneyta hjá Mcrosoft, sum í dag eigur at kalla allan heimsmarkna›in, tá ta› kemur til skrivstovuloysnir.

Um vit veruliga skulu gagnn‡ta sparingar og vøkstur, sum er í n‡ggju tøknini, er ta› umrá›andi at vit ikki læsa okkum føst í eina loysn, i› enntá hevur heimsumfatandi einkarætt, sigur Ove Hollritz, sum í hesum sambandi meinar vi› Microsoft og Windows.

Star Office hevur eisini fingi› vind í seglini, aftaná at teldukoyrikorti innan Star forritini bleiv alment gó›kent.

Í pakkaloysnini hjá Star office eru millum anna› tekstvi›ger›, rokniark, datagrunnur, uppsetanar-forrit, og álmanakkaskipanir. Skráirnar ver›a gjørdar til Windows 95/98, Windows 2000 og NT, og somulei›is til Linux og egnu st‡risskipanina frá Sun, i› nevnist Solaris.

Sun arbei›ir eisini vi› eini webst‡rdari útgávu av forritunum, i› kallast Starportal. Hetta merkir, at ta› ver›ur gjørligt at n‡ta skrivstovuskipaninar beinlei›is gjøgnum eina web skrá ella enntá í eini lítlari hondteldu.

Sambært framlei›slustjóranum, Peter Lange, ver›ur Starportal í løtuni roynt sum ein betra› útgáva hjá einum av teimum heilt stóru donsku Alnet fyritøkunum, og eftir ætlan ver›ur hon tøk hjá brúkarum einafer› í september mána.

Milliardatí›indi

Seinastu tí›ina hava milliardatí›indi ávirka› heimsfjølmi›larnar. Eitt er at vit eru vor›in 6 milliardir íbúgvar á jør›ini, men nú er eisini greitt, at í ár fara yvir ein milliard fólk at n‡ta Alneti›. Harafturat eru 1 milliard heimasí›ur gjørdar. Og til seinast hevur menningin av samfelagnum ført vi› sær, at ein milliard fólk eru arbei›sleys



Fyri nøkrum vikum sí›an, var› sta›fest, at vit eru seks milliardir fólk á jør›ini. Hetta er sjálvsagt ein meting, men nógv var› gjørt burtur úr einum n‡›fø›ingi, i› skuldi sigast at vera íbúgvi nummar 6.000.000.000, ja tú las rætt, 9 nullir geva eina milliard.

Ta› eru 13 ár sí›an at íbúgvi nr. 5.000.000.000 var› føddur, og um ikki meira enn 7 ár, so ver›a vit 7 milliardir fólk á jør›ini. Vi› ø›rum or›um, fólkatali› á jør›ini er eksponentielt vaksandi.

Eitt anna›, i› veksur enn skjótari enn fólkatali› á Mó›ur Jør›, er tali› av fólki, i› n‡tir Alneti› dagliga. At vit ver›a yvir ein milliard, i› n‡ta Alneti› innan ári› er úti, er longu sta›fest. Hetta merkir sostatt, at meira enn ein sættapartur av fólkunum í heiminum dagliga koma at surfa, chatta ella maila, tá vit skriva ultimo 2000

Og so var ta› í seinastu sló›brótandi sendingini hjá Jersild (Rapporten), har avdúka› var, at ta› nú eru yvir ein milliard heimasí›ur til, so ta› er ongin sum ke›ir seg á tøkniliga motorvegnum longur.

Um ta› er tøkniliga menningin, ella ein blandingur av faktorum, i› skapa ovurstóra arbei›sloysi› vit hava í heiminum í dag, er ringt at siga, men fyri eini viku sí›ani, kom Alnetavísin Labour News vi› teimum sjokkerandi tí›indunum, at ein milliard fólk í dag eru arbei›sleys. Hetta átti ikki at veri› so, og vónandi hava hesi tí›indi vi› sær, at onkur fer at gera okkurt munagott vi› hetta – livst so spyrst.

finn@sosialurin.fo

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo

FØROYA TELE
FAROESE TELECOM
Tinghúsvegur 3 • Postrúm 27 • 110 Tórshavn
Tel. 30 30 30 • Fax 30 30 31
T-postur: ft@ft.fo
Heimasíða: www.tele.fo

ELEKTRON
...ein livandi leiklut í kunningarsamfelagnum

SpF Teldu Tænastan
Staravegur > Tlf.: 31762 > Fax: 317699 > www.tt.fo
Vit hava stórt úrval av:
Teldum > EDV-tilhoyri
Printarum > Telefax
Scannarum > Forritum
Telduspølum > Fartelefonum
Skrivstovumøblum

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
útbúgving, eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla
Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177 • FO 110 Tórshavn
Tel. 31 88 13 • Fax 31 33 74
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo
Heimasíða: http://sth.olivant.fo

WWW.VIT.FO Tlf: 31 99 14
SKEIÐ - NETUMSITING - HEIMASÍÐUR
JournalVIT - GóðskuVIT - KommunuVIT - IntraVIT

sam~teld